# Endiliga kom sigurin

**Teir føroysku telvararnir eru nú í góðum hýri, tí endiliga kom sigurin, sum teir høvdu bíða eftir. Teir høvdu helst ætlað sær hann í øðrum umfari, men vóru noyddir at bíða til 4. umfarð. Føroyar vunnu 2,5-1,5 móti Jameika, styrkismett eitt sindur aftanfyri Føroyar sum nummar 98**

TALV-OL
*Jákup Sørensen*

**Bled:** Byrjanin hjá føringum var vánalig. Martin Poulsen, sum telvaði á fjórða borði var at kalla alt talvið í stórum trupulleikum og kom enntá eisini í svára tíðarneyð, ein stóran part av talvinum var hann noyddur at kalla at spæla snartalv móti mótstøðumanninum, sum enn hevði ovmikið av tíð. Tað gjørdist einki hjá Martini hóast hann stríddist manniliga og hann var noyddur at leggja kongin fyri Duane Rowe (2195).

Fyrstur at fáa føroyingum stig, var Heini Olsen á triða borði, hann leikti javnt móti Jomo Pitterson (2248), sum hevur nett sama styrkital, sum Heini, so hetta var helst á eini leið. Sjálvur helt Heini at hann stóð betri, men støðan var sera fløkt, tí valdi hann at taka javnleikin, eisini tí hann skuldi koma fyri seg eftir tapið sunnudagin, tá ið hann var settur mát.

### Fremstu borðini drúgv

John Arni Nilssen og serliga John Rødgaard hava verið drúgvir í hesi kappingini og hava fingið føringum meiri enn helmingin av stigunum, sum komin eru.

Skopuningurin á fyrsta borði telvaði móti FM Warren Elliott (2238). Teir leiktu eina byrjan, sum er ástøðiskend og har vísti tað seg skjótt, at John Arni var hin stinnari. Eftir dystin segði John Arni at hann alla tíðina kendi á sær, at hetta fór at ganga væl og tá ið 10 leikir vóru leiktir var lítið at ivast í at tað bar rætta vegin. Warren Elliott royndi at bjóða John Arna javnleik, men hann havnaði uppskotinum.

Tá ið John Arni hevði leikt sín 26. leik legði hin kongin. Tað var ikki bara John Arni, sum helt talvið vera gott. Rani Nolsøe helt, at John Arni telvaði eitt brandtalv og liðskiparin og fleiri av leikarunum hjá Jameika róstu honum eisini. Teir siga seg vera sinnaðar at bjóða John Arna og øðrum føroyskum telvarum til Jameika at luttaka í kappingum

- livst so spyrst.



*John Rødgaard var ísakaldur í seinasta og avgerandi talvinum, og so mátti landsliðsvenjarin, Rani Nolsøe, finna champagnufløskuna, sum varð keypt á fyrsta degnum, fram*

### Bíðaðu eftir John

Nú var bara eitt at gera og tað var at bíða eftir John Rødgaard, mundi hann klára at vinna á Shane Matthews (2239) ella endaði tað við enn einum javnleiki og tískil javnleiki fyri alt liði?

Hjá tí, sum ikki er so talvkønur er frægast at hyggja eftir telvarunum, hvussu hábrøgd og annað eru. Jú har mundi standa væl til, tí eina løtu fór John upp at vála. Men sá John Arni ikki eitt sindur skeptiskur út og dekan fari um ikki eisini Rani var farin at rista eitt sindur við høvdinum. Var tap í hendi? Nei so ringt var tað kortini ikki, men allir føroysku telvarnir og tey mongum sum fylgdu talvinum beinleiðis á heimasíðuni hjá talvsambandinum ætlaðu sær at her skuldi sigurin koma.

Nú høvdu vit sett álitið á John, sum frægast mátti vera at eygleiða hann. Nú setti hann seg aftur – hugsaði eina løtu og flutti so við fastari og avgjørdari hond. John mundi vita, at hetta tapti hann ikki. Ein løta gekk og Matthews flutti eisini nakað avgjørt, men kortini ikki so sanførandi sum John. Her mann væl standa til, tí nú flenna bæði John Arni og Rani. Jú rætt var, Matthews flutti bara tveir leikir afturat so legði hann kongin. John Rødgaard vunnið sítt annað talv uppí slag og meiri umráðandi Føroyar hava vunnið fyrsta sigurin

### Champagna á liðfundinum

Gott lag var á øllum í føroyska hópinum og helst mundi tað gerast betri, tá ið Rani skonkti champagnu á liðfundinum. Fløskan var keypt ein av fyrstu døgunum í Bled og ætlað til fyrsta sigurin. At hann ikki kom fyrr enn í fjóðra umfari, var ikki eftir ætlanini hjá teimum, men hon mundi gagnast líka væl kortini.

**Føroysku úrslitiini í 4. umfarinum:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | FM - John Arni Nilssen (2385) – FM Warren Elliott (2238) | 1-0 |
| 2 | IM John Rødgaard – Shane Matthews (2239) | 1-0 |
| 3 | FM Heini Olsen (2248) – Jomo Pitterson (2248) | 0,5-0,5 |
| 4 | Martin Poulsen (2160) - Duane Rowe (2195 | 0-1 |

Føroyar hava nú 7 1/2 stig av 16 møguligum og tað er næstan nógmikið at fáa tey 50% sum vónin er at fáa á olympiaduni.

Fremst í kappinini eru Russland, Kuba og Armenia øll hava 13 stig. Svøríki er fremst av norðanlondunum, teir hava 10,5 stig, Danmark hevur 10 stig. Noreg 9,5 stig, Finnland og Ísland hava 9 stig.

Týsdagin telvaðu Føroyar móti Kosta Rika. Teir eru styrkismettir sum nummar 70 og flestu telvarnir hava omanfyri 2400 í rating. Helst verður dysturin torførur. Serliga Heini Olsen kann fáa seg royndan, tí á 3. borði hevur kosta Rika ein 14 ára gamlan altjóða meistara, sum hevur góð úrslit at vísa á. Í fyrsta umfari telvaði hann javnt móti russiska stórmeistaranum Morozevich. Teir sum mannað liðið móti Kosta Rika eru. John Arni Nilssen, John Rødgaard, Heini Olsen og Eyðun Nolsøe.

# B68 fjøruti ára stovningarveitslu

**Hóast navnið sigur ’68, so varð Tofta Ítróttarfelag stovnað í 62, og nú skal rundi dagurin haldast**

FØÐINGARDAGUR
*Tíðindaskriv*

Jú, tú hevur lisið rætt. Leygarkvøldið 2. november hevur ítróttarfelagið á Toftum 40 ára ársveitslu. Men her er okkurt, ið ikki rímar saman, hugsar lesarin, tí tað eru bara 34 ár síðani vit skrivaðu 1968.

Rætti samanhangurin er kortini ikki so torskildur. Tofta Ítóttarfelag, sum almenna navnið framvegis er, varð stovnað í 1962. Tá var tað kappróður, ið stóð ovast á listanum.

Nógv ár frammanundan høvdu toftamenn spælt fótbólt móti fuglfirðingum, eiðismonnum, gøtumonnum og øðrum, men tað var undir navninum Zig-Zag, eftir fyrsta bóltinum teir fingu hendur á. Í 1968 bleiv fótbólturin so ein undirdeild í Tofta Ítróttarfelag, og hagani kemur navnið B68.

Í gerðabókini hja felagnum sæst, at stovnandi fundurin var í Gamla skúla 21. desember 1962. Á skránni vóru:

1. Stovnan av ítróttarfelag
2. Byggjan av kappróðrar báti
3. Stjórn og nevnd

Allir vóru samdir um, at navnið á felagnum skuldi verða Tofta Ítróttarfelag, stytt TÍ, og at felagið skuldi ikki bert umfata kappróður, men eisini fótbólt, hondbólt og annan ítrótt. Ein tepur meiriluti var fyri, at byggja eitt 8-mannafar.



*Hetta er fyrsta liðið, sum spældi fyri B68. Standandi frá vinstru: Hanus Lómstein, Oddmar Færø, Jørleif Jacobsen, Hans Jákup Stenberg og Hans William Stanner. Húkandi frá vinstru: Mogens Nannestad, Eyðfinn Færø, Sverri Danielsen, Haldur Gaardbo, Harry Hansen og Janus Jensen*

### Nøvnini

Í fyrstu nevndina í Tofta Ítróttarfelag komu Betuel Hansen, formaður, Toftir, Frede Benjaminsen, kassameistari, Nes, Dánjal Eli Højgaard, Toftir, Hans J. Johannesen, Toftir og Kaj Højgaard, Toftir.

Stutt eftir at felagið var stovnað, smíðjaði kendi bátasmiðurin Niclas í Koltri 8-mannafarið Toftabátin og seinni 5-mannafarið Ternuna. Tá fótbólturin veruliga tók dyk á seg á Toftum, datt kappróðurin niður fyri. Spell, halda helst mong. Men fótbólturin hevur har aftur ímóti klárað seg væl í kappingini. Felagið hevur verið í 1 deild síðani 1980 og hevur sum kunnugt vunnið fleiri meistaraheiti.

Harafturat er leikvøllurin á Svangaskarði vorðin kendur um allan heimin sum ein sannur skansi hjá føroyska fótbóltslandsliðnum

Teir, ið manna nevndina í Tofta Ítróttarfelag, nú felagið fyllir 40 ár, eru Niclas Davidsen, formaður, Jógvan Højgaard, næstformaður, Ólavur Jensen, skrivari, Eyðfinn Olsen, kassameistari og Martin Heinesen, nevndarlimur.

Í fótbóltsnevndini eru Katrin Olsen, Katrin Jönsson, Eldbjørn Joensen og Peter Alberg.

40 ára ársveitslan hjá Tofta Ítróttarfelag verður altso á Svangaskarði nú leygarkvøldið 2. november kl. 19.30. Nú felagið fyllir 40 ár, verður gjørt meira burtur úr veitsluni enn vanligt.



ER BILURIN
skitin
mattur
keðiligur
Fá hann sum nýggjan
Vit: *vaska *slípa *polera *forsegla
UTTAN
OG
INNAN
Vit viðgerða eisini stórar bilar og bussar
Ring og hoyr nærri !!
Føroya Bilshine
Bakkavegur 6
FO-625 Glyvrar
Tlf. 448934 · 228934

Lýsið
við
brúktum
bilum
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lærari til Kollafjarðar skúla

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Kollafjarðar skúla at undirvísa 21 tímar um vikuna frá 22.11.2002 til uml. 06.06.2003 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlaleiðaran tel 42 14 75 ella skúlastýrisformannin tel 42 16 09.

Umsóknir við avriti av prógvum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 14.11.2002.

Kollafjarðar skúlastýri
v/ Dortheu Joensen
FO-416 Signabøur

team85

NÝGGJAR OPNINGSTÍÐIR HJÁ P/F WENZEL
Bilasølan hevur nú opið soleiðis:
Mánadag - fríggjadag frá kl. 08.00 - 17.30
Leygardag frá kl. 10.00 - 16.00



Vit síggjas hjá:
P/f Wenzel
Akranesgøta 5 • 100 Tórshavn • tel. 313874/ fax 311173
www.wenzel.fo

Leikhúsið Gríma
framførir
Ginu-søgur
eftir Eve Ensler
leikstjórn Ria Tórgarð
í Mentanarhúsinum
í Fuglafirði
sunnudagin 3.11. kl. 16.00 (útselt)
EYKASÝNING
sunnudagin 3.11. kl. 19.30
Atgongumerki á 100,- kr. fáast á Kunningarstovuni í Runavík og í Fuglafirði.

Føroya Postfelag
Søkt verður eftir skrivara

Føroya Postfelag søkir eftir skrivara at byrja 1. november ella skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Afturat vanliga skrivstovuarbeiðinum, skal skrivarin taka sær av roknskapinum hjá felagnum og verða skrivari á felagsins fundum.

Umsókn verður at senda skjótast tilber til:

Føroya Postfelag
Tinghúsvegur 15
100 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið á tlf. 317231 ella 217231.

Gróðurin á Landgrunninum í 2002
og
Hvussu royndust yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinasyni í 2002

Hesum greiða ávikavist Eilif Gaard og Jákup Reinert frá hóskvøldið 31. oktober kl. 19.30 á Fiskirannsóknarstovuni í Nóatúni 1.

Eftir fyrilestrarnar verður lutakast um kr. 10.000 millum øll fiskamerki, ið eru komin inn á Fiskirannsóknarstovuna seinasta árið.

Fiskirannsóknarstovan

Leikhúsið Gríma
framførir
Ginu-søgur
eftir Eve Ensler
leikstjórn Ria Tórgarð
í Losjuni í Gøtu
hóskvøldið 31.10. kl. 19.30
Atgongumerki á 100,- kr. eru at fáa á tlf. 441737 eftir kl. 13.00 hósdagin og við dyrnar ein tíma undan sýning.

Reingerðingsfólk

Søkt verður eftir reingerðarfólkum til Føroya Sjómansskúla frá 1. januar 2002.

Starvið er fast starv, lønt sambært sáttmálanum hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Arbeiðstíðin er 4 tímar um dagin 5 dagar um vikuna.

Umsóknir skulu sendast til:

Føroya Sjómansskúla
Postboks 104
FO-110 Tórshavn

og vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 20. november 2002.

Føroya Sjómansskúli